FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-095_1.6
dags. 02-02-2011

Vinnumálaráðið

vmr vmr.fo

Viðv.: Uppskot til løgtingslóg um jarðhitaskipanir
Felagið hevur móttikið tygara uppskot 13-01-2011 og er málið viðgjørt á stýrisfundi 14-01-2011.

Sæð í mun til høgu orkuprísirnar og vaksandi umhvørvistilvitanina hjá fólki, er sannlíki fyri, at fólk frameftir fara at nýta alternativar orkukeldur, m.a. hita úr undirgrundini. Hetta skal sjálvandi gerast á ein skipaðan hátt. Felagið heilsar tí reglum fyri jarðhitaskipanir vælkomnum.

Viðmerkingar til uppskotið
Viðmerkingarnar eru bert til umsitingarliga partin av uppskotinum, ið viðvíkur kommununum. Felagið hevur valt ikki at gera viðmerkingar til tekniska partin.

Kommunali byggimyndugleikin
Kommunan er lokalur byggimyndugleiki. Felagið metir, at installatión av jarðhitaskipan er bygging, og loyvi tí eigur at fáast frá byggimyndugleikanum.

Tískil eigur loyvi at fáast frá kommunala byggimyndugleikanum og ikki frá landsstýrinum.

Um neyðugt kann kommunan fáa neyðuga tekniska ráðgeving til vega frá Jarðfeingi ella øðrum privatum veitara. Kostnaðurin fyri hettar eigur at kunna leggjast á gjaldið fyri byggiloyvi.

Vatnrættar boringar
Í § verður ásett at lodrættar boringar krevja viðgerð av kommununi. Vatnrættar installatiónir verða ikki nevndar her. Ein vatnrøtt installatión, á jarðarstykki hjá borgara, kann ávirka jarðfestar kommunalar installatiónir, t.d. vatn og kloakk. Tí metir felagið, at kommunan eisini eigur at viðgera hesar installatiónir.

fyri felagið

Asbjørn Djurhuus, form. Bergmann Finnsson, ráðgevi.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo